## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur, um kvøldið kavaælingur. Eisini sólglottar og hitin millum 1 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin lot til andøvsgul av útnyrðingi, men seinnapartin veksur hann vindin upp í hvassan vind av norði. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum minus 1 og minus 4 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Hvassur vindur ella skrið av útnyrðingi og norði og kavaælingur, men onkur sólglotti. Hitalagið millum minus 2 og minus 5 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin minkar hann vindin av norði og yvirhøvur turt. Hitin um 3 stig. Sunnudagin veksur hann vindin av útnyrðingi og norði og kavaælingur, Hitin um frostmarkið.

# 700 eyka gávulutir á sama stað

**Hósdagin letur nýggj gávubúð upp mitt í Havn við Janu Johannesen sum leiðara. Handilin »X-tra« er fyrsti handil av slíkum slagi á føroyskari jørð**

HANDIL
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Í morgun stríddust tey við at seta allar hesar hundraðtals lutirnar uppá pláss. Men í ovurmorgin letur X-tra upp í leigaðum hølum í sama bygningi, har bókahandilin hjá Hjalmari Jacobsen áður helt til.

- Vit meta at tørvur er á einum handli við bíligum og spennandi lutum, ið ein ikki fær so nógva aðrastaðni, sigur Jana Johannesen.

Líknandi handlar sum hesin eru kendir í Danmark. Sermerki teirra eru teir bíligu gávulutirnir, sum kosta frá 10 krónum og upp í 200 krónur, - teir flestu tó í bíligara endanum.

Fyri at fáa pláss fyri øllum hesum 700 ymisku gávulutunum er kjallarahæddin eisini innrættað sum handil.

- Her er okkurt til øll, slær Jana Johannesen fast.



*Jana Johannesen í ferð við at seta nakrar av teimum 700 ymisku gávulutunum uppá pláss*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | -3 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 12 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 6 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | 7 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 4 |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 10 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 13 |
| Róm | 17 |
| Malorca | 17 |
| Athen | 19 |
| Malta | 19 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 7 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | -- |
| New York | 9 |
| Miami | 17 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 27 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 21 |

## LUFTTRÝSTIÐ



**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1002 hPa. vestan fyri Ísland fer eystureftir og dýpist. Brúgvalagið verður yvir Føroyum í kvøld – týskvøld.



**Í dag:**
Lágtrýstið norðan fyri Ísland fer í landsynning eystan og dregur kalda luft av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 16/11 kl. 06⁰⁰ – 17/11 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í november: -4,0° - Mesti hiti máldur í november: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 16/11 kl. 06⁰⁰ – 17/11 06⁰⁰.
Avfallið higartil í november: 26 mm

Alt um harmonikur



www.simme.eu




## VESTFALLSKYRRINDI

13. novembur Fullmáni
14. novembur Mánin næstur jørðini
19. novembur Seinna kvarter
29. novembur Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 18. nov | 10:47 | 23:25 | 9:47 | 22:25 | 10:02 | 22:40 | 0:19 | 12:47 | 1:19 | 13:47 | 9:02 | 21:40 | 8:02 | 20:40 | 11:02 | 23:40 | - | 12:02 | 10:32 | 23:10 | 11:47 | - |
| 19. nov | - | 12:04 | 11:04 | 23:40 | 11:19 | 23:55 | 1:25 | 14:04 | 2:25 | 15:04 | 10:19 | 22:55 | 9:19 | 21:55 | - | 12:19 | 0:40 | 13:19 | 11:49 | - | 0:25 | 13:04 |
| 20. nov | 0:40 | 13:17 | - | 12:17 | - | 12:32 | 2:40 | 15:17 | 3:40 | 16:17 | 11:32 | 23:53 | 10:32 | 22:53 | 0:55 | 13:32 | 1:55 | 14:32 | 0:25 | 13:02 | 1:40 | 14:17 |
| 21. nov | 1:38 | 13:59 | 0:38 | 12:59 | 0:53 | 13:14 | 3:38 | 15:59 | 4:38 | 16:59 | - | 12:14 | 11:14 | 23:34 | 1:53 | 14:14 | 2:53 | 15:14 | 1:23 | 13:44 | 2:38 | 14:59 |
| 22. nov | 2:19 | 14:40 | 1:19 | 13:40 | 1:34 | 13:55 | 4:19 | 16:40 | 5:19 | 17:40 | 0:34 | 12:55 | 11:55 | - | 2:34 | 14:55 | 3:34 | 15:55 | 2:04 | 14:25 | 3:19 | 15:40 |